# Nøvn

## Jógvan Waagstein um Ólavsøku-kantatuna

Í fororðunum til Ólavsøkukantatuna, sum varð útgivin í 1946, skrivar J.Waagstein soleiðis:

Í 1930, tá talan var um at halda 900 ára minningarhátíð fyri Ólavi kongi, hinum heilaga, hildu fólk, at hom átti at verið gjørtd serliga hátíðarlig bæði í kirkju og á tingi.



*Jógvan Waagstein*

J. Dahl, próstur, heitti á Havnar Sangfelag um at vera við til at fáa sangin í kirkjuni henda Ólavsøkudag so góðan og hátíðarligan sum møguligt.

Sum organistur í Havnar Kirkju og sum samgstjóri fyri Havnar Sangfelag fór eg tí undir at fyrireika hetta sum best. Sangfelagið sang henda dag í kirkjuni nøkur av okkara gomlu sálmaløgum, umframt ta stóru messuna hjá Palestrina:"Heiður verið Guði á hægsta himni", sum J. Dahl, próstur, hevur umsett úr latínskum máli.

Nógvir vóru teir Føroyingar, sum bóru upp á mál, at eitt hvørt átti at verið gjørt fyri at geva tingsetuni hetta ár ein serligan hátíðardám. Eg vendi mær til Edv. Mitens, sum tá var løgtingsformaður, viðvíkjandi hesum máli, og vit komu ásamt um, at hann skuldi skriva orðini til eina kantatu og eg tónaløg til teirra.

Hesa kantatu, sum tá kom í lag, og sum nú við hávirðing verður ognað Føroya Løgtingi, sang mannskórið Havnar Sangfelag fyrstuferð hetta ár, og hon er síðan vorðin framførd nakrar ferðir á Ólasvøku undan tingsetuni.

Síðan hava nógv fólk heitt á meg um at fáa tónaløgini til hesa kantatu, men sum viðurskiftini hava verið, hevur tað verið ógjørligt.

Av tí at tað tykist vera áhugi hjá fólki fyri hesum tónaverki, var tað hugsan mín, at tað hevði verið beint at tað varð prentað.

Tað er mín vón, at tað so við og við koma góð mannskór víða um land okkara, og skuldi eg her sett fram eitt ynski, var tað hetta, at tað fer at vera fastur siður, at hesi mannskór á hvørjum ári undan ólavsøku koma til Havnar og sum eitt Føroyakór saman syngja hesa kantatu. Hetta vildi verið gagnligt fyri kórsangin í Føroyum og verið ein vakur máti hjá okkum Føroyingum at heiðra Løgting okkara og minnast Ólav kong.

Áðrenn kantatan verður sungin, havi eg, sum tað sæst, ætlað at sungin eigur at vera:"Fjallprúða heim", og eg kundi hugsað mær, at ein hvør millum henda sang og kantatuna segði nøkur hóskandi orð.

Stórbæri sálmurin aftaná sjálva kantatuna vænti eg vil geva øllum verkinum tann rætta hátíðardám, og vóni eg, at hetta alt vil verða ein fulltónandi heild.

Tórshavn desemb. 1946
J. Waagstein

# Arni Clementsen seksti

Mikudagin 14. juli verður Arni Clementsen seksti. Arni, sonur Honnu og Dáva Clementsen, er føddur og uppvaksin í Havn, fór eftir lokna skúlagongd í snikkaralæru hjá Zacharias Bech, har hann lærdi til møbilsnikkara. Eftir hetta fór hann til Horsens, har hann í 1974 tók prógv sum byggifrøðingur.

Arni arbeiddi í nøkur ár hjá Pihl & Søn, har hann m.a. stóð fyri útstykkingini á Kornmansmýru. Í 1980 byrjaði hann sum faklærari á Tekniska Skúla í Havn, og varð fyri umleið tveimum árum síðani settur sum leiðari á Skúlaheiminum.

Skal nakað stutt sigast um Arna, so er hann sera hegnigur, væl lýddur hvar hann er, og ikki minst hjálpsamur, eru boð eftir honum. Er nakað, sum hann ikki dugir, so er tað at siga nei, um onkur hevur hjálp fyri neyðini.

Hóast Arni ikki longur er so virkin innan skótarørsluna



hjá KFUM, sum hann annars hevur verið frá barnsbeini, so er hugtakið »Einaferð skóti, altíð skóti« galdandi framvegis, og ikki eru tímarnir fáir, sum hann hevur lagt í hetta frítíðarítrivið. Ikki minst við skótadepilin á Selatrað.

Arni giftist við Ellu í 1975. Børnini eru tvey, Pætur, sum er 29 og Hanna, sum er 23. Og nú er eisini verdótturin, Birgitta, komin í familjuna. Familjan stendur honum allar nærmast, og í heimi teirra við Mýrisnípuvegin hava øll alla orsøk at kenna seg væl.

Arni ger vanliga ikki nógv hóvasták úr sær sjálvum, men nú hevur hann gjørt av at halda føðingardagin fyri øllum teimum, sum hava hug at heilsa uppá hann. Føðingardagurin verður hildin á Skúlaheiminum við Marknagilsvegin leygardagin 17. juli millum klokkan 12 og 16.

t.

# Merkisdagar

### Gullbrúdleyp

Fríggjadagin 23. juli hava Hergerð og Eiler Samuelsen bakari Klaksvík gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin í K.F.U.M & K í Klaksvík frá kl 19 har øll eru hjartaliga vælkomin.

### Gullbrúdleyp

Tann 23. juli eru liðin 50 ár síðani Katrin og Alex Sólstein vórðu hjúnavígd í Klaksvíkar kirkju. Tey eru burturstødd gullbrúdleypsdagin, tí saman við dreingjunum og familjum teirra endurtaka tey brúdleypsferðina til Noregs fyri fimmti árum síðani.

### Silvurbrúleyp

Týsdagin 17. august hava Jónleyg og Fríðálvur Bláhamar Vestmanna silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin leygardagin 21. august frá kl 12 til 18 í ítrottarhøllini í Vestmanna. Tey, ið ynskja at gleðast saman við okkum, verða vinaliga biðin um at siga frá innan 4. august á tlf 424407.

### Silvurbrúdleyp

Týsdagin 27. juli hava Sonja og Poul í Leirvík verið gift í 25 ár. Vælkomst verður í Bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19. Tey sum ynskja at koma, verða biðin at siga frá innan 18. juli, á tlf. 743058 (Sonja), tlf. 589080 (Poul) ella skriva til poul_p@post.olivant.fo

### 90 ára føðingardagur

Mikudagin 14. juli verður Hans Marius (Lilleven) Johansen, Tvøroyri 90 ár. Tey, ið ynskja at heilsa uppá Lilleven henda dagin eru hjartaliga vælkomin á Hotel Tvøroyri ímillum kl 11.00 og 15.00.

### 90 ára føðingardagur

Leygardagin 24. juli heldur Elisabeth Olsen sín 90 ára føðingardag á Sandáarbreyt 7. Tey, ið vilja heilsa upp á hana, eru hjartaliga vælkomin millum kl. 11 og 15.

### 90 ára føðingardagur

Mánadagi 26. juli verður Hanna Ziska, Klaksvík, 90 ár. Føðingardagurin verður hildin á Sjómansheiminum í Klaksvík kl. 18 sama dag. Tey, ið vilja heilsa upp á Honnu, eru hjartaliga vælkomin.

### 85 ára føðingardagur

Leygardagin 17. juli verður Leif Djurhuus Vágur 85 ár. Tey, ið vilja heilsa upp á Leif henda dagin, eru hjartaliga vælkomin á Eldrasambýlið í Vági millum kl. 14 og 17.

### 75 ára føðingardagur

Mikudagin 14. juli fyllir Gullberg Gullfoss í Hoyvík 75 ár. Hann er burturstaddur føðingardagin.

### 75 ára føðingardagur

Mánadagin 19. juli fyllir Daniella Olsen, Hósvík, 75 ár. Dagurin verður hildin í bygdarhúsinum sunnudagin 18. juli frá kl 17. Øll eru hjartaliga vælkomin.

### 70 ára føðingardagur

Leygardagin 17. juli verður Elsa Jacobsen, Leirvík 70 ár. Dagurin verður hildin í húsunum hjá Leirvíkar Arbeiðsmannafelag, Eggjarvegur 13, frá kl. 19. Øll eru hjartaliga vælkomin.

### 65 ára føðingardagur

Hósdagin 15. juli verður Páll Petersen, Kaldbak 65 ár. Dagurin verður hildin leygardagin 17. juli frá kl 11 til 16. í Pálsstovu til brunch. Gott at sæð familiu, vinir og kenningar hendan dagin.

### 60 ára føðingardagur

Mikudagin 14. juli verður Arni Clementsen, Tórshavn 60 ár. Í hesum sambandi verður buffet á Skúlaheiminum við Marknagilsvegin leygardagin 17. juli millum kl. 12 - 16, har øll eru hjartaliga vælkomin.

### 60 ára føðingardagur

Mikudagin 4. august verður Heiðveig Tindskarð, Tórshavn, 60 ár. Føðingardagurin verður hildin í Róðrarneystinum á Argjum leygardagin 17. juli kl. 18. Tey ið vilja gleða Heiðveig við at koma í føðingardag, verða vinarliga biðin um, at siga frá innan 1. juli á tlf.: 317326/264030 (Heiðveig), 277556 (Barbara), 227796 (Yvonna).

### 30 ára føðingardagur

27. juli fyllir Theodor Esmar Hansen 30 ár. Føðingardagurin verður hildin leygardagin 24. juli kl. 18 í Bowling í Leirvík. Tey, ið vilja gleða Theodor Esmar við at koma í føðingardag, verða vinarliga biðin um at siga frá innan 15. juli á tlf. 421309 ella 721309